Strandferðslan sóknast eftir

# roknskaparfólk/ controller

**Av tí at okkara virkandi fíggjarleiðari – og annars roknskaparfólk/controllari á Fíggjardeildini – hevur sagt seg úr starvi, verður starvið sum roknskaparfólk/controllari lýst leyst til at seta skjótast gjørligt.**

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá roknskaparfólkinum/controllaranum er at menna fíggjarstýringina á SSL og at halda fast við menningina, ið hevur verið seinastu árini. Aðrar uppgávur eru:
- Játtanareftirlit (samlað og fyri rakstrarstað)
- Uppseting og viðlíkahald av mannagongdum
- Játtanarlig og roknskaparlig ráðgeving til deildarleiðarar
- Uppseting av hagtølum
- Ad-hoc lýsingar

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur:
- hevur HA, HD, HH ella líknandi prógv
- hevur royndir innan bókhald, grannskoðan e.l.
- er hollur teldubrúkari
- hevur kunnleika og royndir í Navision-fíggjarstýringsskipanini og Microsoft Office forritunum
- hevur kunnleika til LøttLøn-lønarskipanina
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva
- hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- hevur góðan røkjuskap

Talan er um eitt starv við stórum og spennandi avbjóðingum, har ið tað stundum kann verða talan um átrokandi uppgávur. Samstundis fært tú tó møguleika fyri at skipa starvið sjálvstøðugt út frá givnu karmunum.

**Fíggjardeildin**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna fíggjarstýringina hjá fyritøkuni. Aðrar uppgávur eru:
- Fyriskiping av roknskaparverkinum
- Uppseting av fíggjarætlanum
- Játtanareftirlit
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Innkeyps- og goymslustýring
- Lønarfyrisiting

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er lønt í 6. lønarflokki.
Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 26. mars 2007 kl. 12.00. Til ber eisini at senda umsóknina til t-postadressuna: pah@ssl.fo.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksen, virkandi fíggjarleiðara ella Niels Juel Arge, virkandi stjóra á tlf. 343000 ella senda t-post: jor@ssl.fo ella nja@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir). Talið á flutningsanleggum eru 40 bussar og 8 ferjur. Samlaða talið á starvsfólkum á SSL svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo


# Kom og dansið við Jamie Boylan!



**Týsdagin seinnapartin verða øll ung millum 15 og 25 ár boðin á cool dansiskeið í Eysturskúlanum í Havn. Tað eru Ung í MáF sum skipa fyri**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Dámar tær hiphopp, breakdance, ballet, ella dámar tær rætt og slætt at røra teg, so fært tú høvi hjá Jamie Boylan at samansjóða alt tað, sum tú dugur, og at flyta teg ávegis, áfram, gjøgnum hamskifti til broyting. Hetta lova Ung í Máf, sum hava tikið stig til dansiskeiðið, har enski dansarin Jamie Boylan fer at leggja ungu føroyingunum lag á.

**Kendur dansari**
– Óansæð hvønn dansin, tær líkar best, um tú ert roynd ella óroynd, so er Jamie Boylan maðurin. Hansara spennandi máti at arbeiða við contemporary dance samansjóðar tað dynamiska arbeiðið á gólvinum og rørslur, sum loysast, spretta og vaksa út í rúmið, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Jamie Boylan er onglendingur og hevur útbúgving frá London Contemporary Dance School. Hann undirvísir í løtuni á fleiri ymiskum skúlum í Onglandi, eins og hann dansar í Aletta Colins Dance Company og Arty Physical Intelligence.

Í Føroyum er Jamie Boylan best kendur sum dansari í føroysku operuni "Í Óðamansgarði". Meira um Jamie Boylan á: *www.artyphysicalintelligence.co.uk*

**Tekna teg nú!**
Dansiskeiðið verður í Eysturskúlanum týsdagin 27. mars kl. 17-20, og øll ung millum 15 og 25 ár eru vælkomin. Tá verður eisini møguligt at tekna seg sum lim hjá í Ung í MáF, har limagjaldið er 100 krónur árliga. Tekning til skeiði fer fram hjá MáF í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2007, og er kostnaður fyri skeiðið 200 krónur.

Samband fæst við Birnu Heinesen, næstforkvinnu í MáF á 222443, ella á *birna@hotmail.com*. Skrivstovuna hjá MáF hevur nummar 315624, ella *maf@maf.fo*

# Amoena serfrøðingur vegleiðir um bróstprotesur og brósthaldarar

Dagarnar 28. til 30. mars verður Lene Heiberg frá Amoena í Føroyum og hevur viðtalu við kvinnur, sum er skornar í bróstið. Hon fer at kunna og vegleiða um brósthaldarar og rætta tillaging av bróstprotesum. Tað er Siri Vælvera, sum hevur boðið Lene Heiberg hendanvegin.

Strembað verður alsamt eftir, at ein protesa skal vera so natúrlig, sum yvirhøvur gjørligt; bæði í kenslu og útsjónd. Menningin gongur skjótt, og tí verður støðugt kunnað um betringar og nýggjar møguleikar. Eisini í Føroyum.

Samanumtikið snýr tað seg um at geva kvinnuni eina góða kenslu av sær sjálvari.

Kvinnur, sum hava fingið bøtt um bróstið, ella hava fingið skurðviðgerð fyri at varðveita tað, varnast oftani, at sum frálíðir broytist og minkar bróstið. Her kann vera nógmikið við eyka fyllu, ella nýggjari tillaging av brósthaldaranum.

Men, Lene Heiberg hjálpir og vegleiðir eisini kvinnum, sum hava brúk fyri serligum protesum og bh loysnum. Hon er fremsti serfrøðingurin í Danmark á sínum øki og framúr góð í ráðum.

Av tí at Siri Vælvera í Havn hevur alt landið sum starvsøki, fer Lene Heilberg eisini

út í oyggjarnar at hitta viðskiftafólk, um áhugi er fyri tí.